**Atlanticpane** P/F
Tlf.: 42 14 05 • Fax 42 16 02

## Fólk søkist

Kundi tú hugsað tær at verði ein av okkara.
Vit sóknast eftir einum fólki at arbeiða hjá okkum.
Byrjast kann beinanvegin. Arbeiðið er fjølbroytt, bæði innan- og uttandurða. Vit framleiða termorútar og alt innan glas / spegl og innrammingar.

Vit ynskja tú hevur:
- Góðan samstarvsvilja
- Ábyrgdarfull/ur
- Arbeiða sjálvstøðg/ur
- Góða uppmøting
- Koyrikort

um so er send okkum nakrar reglur.

**Atlanticpane P/F**
Postsmoga 30
410 Kollafjørður

## HELE NORDENS HØJSKOLE

**Fuldtidskurser på 5- 9 måneder**

- Journalistik – seriøs grunduddannelse
- Nordisk Horisont -kultur, rejser, reportage (skriv/foto)
- Teater – grundlæggende og varieret dramauddannelse
- Viselinjen – sang og scenetræning i masterclass

***Halve fripladser tilbydes elever fra Færøerne.***
***Også mulighed for dansk højskolestøtte.***
Adgangskrav: studenter-, HF-eksamen eller lign.

**NORDISKA FOLKHÖGSKOLAN**
Olof Palmesväg 1
44231 Kungälv. Sverige
Tel +4630320 62 00
www.nordiska.fhsk.se

NORDISKA FOLKHÖGSKOLAN KUNGÄLV

## Skrivari til advokatfyritøku

Vit søkja eftir skrivara at starvast niðursetta tíð á skrivstovu okkara skjótast gjørligt. Viðkomandi skal helst hava skrivstovuútbúgving ella hava royndir innan økið. Tað er neyðugt, at viðkomandi er stinnur í føroyskum og donskum, og er tað ein fyrimunur, um viðkomandi dugir væl enskt.

Skrivlig umsókn skal latast skrivstovuni í seinasta lagi 2. mars 2007.

**Advokatfirma Annfinn V. Hansen**
Bryggjubakki 22
Postsmoga 106
110 Tórshavn

tele. (+) 298 359595
fax. (+) 298 359596
t-postur. advokat@advokat.fo

## Fíggjarumsitari á Fiskirannsóknarstovuni

Umsitarin á Fiskirannsóknarstovuni fer í annað starv og hevur fyri fyrst søkt um farloyvi í 1 ár. Í hansara stað verður lýst eftir nýggjum umsitara.

Arbeiðið er undir stjóranum at leiða dagligu umsitingina á Fiskirannsóknarstovuni, vera fíggjarrøkil á stovninum og at vera reiðari á "Magnusi Heinason".

Fiskirannsóknarstovan er granskingarstovnur undir Fiskimálaráðnum og hevur eitt sera fjøltáttað virksemi við árliga afturvendandi uppgávum og verkætlanum yvir styttri áramál. Nærri fæst at vita um stovnin á heimasíðuni www.frs.fo. Umframt verður í løtuni arbeitt við at orða ein avrikssáttmála við Fiskimálaráðið.

Sóknast verður eftir royndum fólki við hollari ástøðiligari vitan.

Lønin er sambært royndum og útbúgving.

Nærri fæst at vita um starvið frá Hjalta í Jákupsstovu, stjóra

Umsóknir til starvið skulu stílast Fiskirannsóknarstovuni, att: Hjalti í Jákupsstovu innan 12. mars 2007. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

FISKIRANNSÓKNARSTOVAN
FAROESE FISHERIES LABORATORY
Postrúm 3051, Nóatún
110 Tórshavn, Føroyar
Telf. (298) 353900
Telefax (298) 353901

## Søkt verður eftir fólki til alingina í Suðuroy

Talan er um 2 fulltíðar størv, at seta skjótast gjørligt. Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um røkt av fiskinum.

Arbeitt verður í eini vaktarskipan, hvar tú, saman við dugnaligum starvsfólkum, fært ábyrgdina av dagliga rakstrinum á tykkara økið.

Vit væntað, at tú ert sera arbeiðssamur, nær lagdur og árvakin í tínum arbeiði, tá hetta eru fremstu eginleikarnir hjá einum góðum alara.

Lønin verður avtalað ímillum leiðslu og umsøkjara.

Um hetta ljóðar áhugavert, ert tú vælkomin at søkja starvið við at senda eina umsókn til.

**P/F Faroe Farming**
Postbox 97
FO-900 Vágur

Ella ringja til Erhard á tlf. 221447 og frætta nærri

Sosialurin -har tað hendir

## Pedagogur ella hjálparfólk til farloyvisstarv

Hevur tú hug at arbeiða á lítlum dagstovni í hugnaligari bygd, so er hetta møgliga nakað fyri teg.

Dagstovnurin í Kvívík søkir pedagog í avloysarastarv fyri barsilsfarloyvið frá **1. apríl 2007** ella eftir nærri avtalu.

Talan er um eitt 3/4 starv, sum verður skipað soleiðis at arbeitt verður fulla tíð í tríggjar vikur ímeðan tann 4. vikan er frívika.

Tann setti kemur at arbeiða bæði í barnagarðinum og í frítíðarskúlaskipanini.

Løn og setanartreytir eru samb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðarafelag Føroya.

Dagstovnurin í Kvívík er samansettur stovnur, sum heldur til í tveimum ymiskum húsum í bygdini.
Ein vøggustovubólkur við 10 børnum og ein barnagarðsbólkur við 20 børnum eru í tí eina húsinum, ímeðan ein bólkur við 5 av teimum elstu barnagarðsbørnum og 11 børnum í skúlaaldri er í einum øðrum húsum í bygdini.

Vit kunnu bjóða hugnaligar arbeiðsumstøður, fitt og krevjandi børn og góðar starvsfelagar.

Innandurða hava vit ikki nógv pláss, men vit hava góðar møguleikar fyri at brúka náttúruna og nærumhvørvið.

Okkara mál við arbeiðinum er at skapa tryggar og mennandi umstøður fyri børn og vaksin innanfyri teir karmar, sum kommunan setur fyri virksemi okkara.

Vit ynskja umsøkjara við viðkomandi útbúgving og royndum, hugi at arbeiða við børnum, hugflogi og løttum sinnalag.

*Meira kann fáast at vita um starvið og viðurskiftini við at tosa við Siborg Arge, leiðara, á telefon 214360.*

Umsóknir við prógvum, viðmælum og CV skulu vera stovninum í hendi innan **5. mars 2007.**

Um starvið ikki verður sett við pedagogi, so verður tað sett við fólki við ørum førleika.

**KVÍVÍKAR KOMMUNA**
**Víkarvegur 5 • FO-340 Kvívík**

## Aglowfundur fyri kvinnur verður í Miðlahúsinum í Vágsbotni

**Leygarkvøldið 24. februar kl. 19.30.**

Elsa í Garði talar um lívið og sangirnar hjá Fanny Crosby.

*Vit gleða okkum at síggja teg.*

AGLOW
**Aglow í Havn**
www.aglow.fo